Synopsa til munnliga prótøku í fólkaskúlanum

Navn NN-6
Flokkur og skúli 9. flokkur
Lærugrein og lærugreinastig Føroyskt, fráfaringarroynd fólkaskúlans
Fyrireiking í bólki? ja ☐ nei ☒ **Um ja, hvørji eru hini í bólkinum?**
Hugdýpingarøki - *hugdýpingarøki, sum næmingurin hevur valt.* Longsul lýstur í ymiskum tekstasløgum.
Tilfar í hugdýpingarøkinum - *lisnir tekstir, myndir, filmar o.a., sum flokkurin hevur gjørt av, skulu vera við í hesum hugdýpingarøki.* Bergtikin: *Hans A. Djurhuus* (1922) Ísmal: *Marianna D. Dahl* (1997) Í búri: *Janus Djurhuus* (1933) Tíðin avdúkar: *Bergur Djurhuus* (1967)

Synopsan er latin inn tann _____

Undirskrift næmingsins: _____

Frágreiðing um prótøkuuppleggið og grundgeving fyri val av hesum - *stutt frágreiðing um prótøkuuppleggið og hví tað er valt (prótøkuupplegg kann vera tekstur, filmur, mynd ella annað, sum næmingurin sjálvur hevur valt at viðgera).*

Eg havi valt stuttsøguna “Glaskrukkan”, sum Høgni Miné hevur skrivað. Stuttsøgan viðger evnið at leingast, at vera fríður. Í Glaskrukkuni brúkar høvundurin myndamál fyri at lýsa ein, sum følir seg fangaðan og ikki passar væl inn. Høgni Miné, sum hevur skrivað stuttsøguna, er nýliga komin út sum samkyndur, og tað tykir, at søgan er um tað, men hon kann setast í samband við nógv onnur evni. Hon kann setast í samband við eina aðru stuttsøgu, sum eitur Ísmal, sum Marianna D. Dahl hevur skrivað, og eisini við yrkingina Í buri hjá Janusi Djuurhus. Tær allar lýsa ein, sum er í einari støðu, hann ikki vil vera í, og tey hava ein longsul fyri at bróta út.

Lýsing av greining og tulkingarøkjum - *næmingurin greiðir frá greining og tulkingarøkjum, sum hann hevur valt at viðgera.*

Greining

- Tíð og stað
- Persónar
- Frásjónargerð
- Forteljarin/frásøgufólkið
- Evni og endamál
- Myndamál

Tulking

- Samanbera við kendar tekstar
- Hvat dámar mær og hvat dámar mær ikki?
- Hvat ímyndir glaskrukkan og firvaldurin?
- Hvat ímyndir myndamálið?
- Hvat fær hetta meg at hugsa og undrast um?

Framløguætlan fyri munnligu prótøkuna - *skrá ella ætlan, sum vísir, hvussu næmingurin heldur, at prótøkan skal fara fram.*

- Eg lesi yrkingina upp
- Hví eg havi valt yrkingina
- Frásjónargerð
- Greining og tulking
- Niðurstøða

Lýsing av frásjónarøkjum (perspektivering) - *næmingurin vísir her á tekstir, filmar og/ella annað tilfar úr hugdýpingarøkinum, sum prótøkuuppleggið kann setast í samband við*

Eg fari at samanbera stuttsøguna "Glaskrukkan" við stuttsøguna "Ísmal", sum Marianna D. Dahl hevur skrivað, og yrkingina "Í búri", sum Janus Djuurhus hevur yrkt.

Í Glaskrukkan, brúkar myndamál fyri at lýsa ein sum følur seg fangan og ikki passar væl inn. Høgni Miné, sum hevur skrivað stuttsøguna, hevur nýliga komi út sum samkyndur og tað tykir at søgan er um tað, men hon kan settast samband við nógv onnur evnur.

Ísmal er ein søga um tveir menn, sum tykjast at vera forelskaðir, men teir tora ikki at koma út við tí, og Ísmal endar við gifta seg við einari penari brúður. Tyril følir seg ónøgdan og fangaðan, og til endans følir hann, at tann einasti mátin var at drepa seg sjálvan. Ísmal livir víðari við sínari konu og fekk børn, men har manglaði altíð okkurt.

Í búri lýsir ein, sum hyggur at einum songfugli, sum situr fangaður í einum búri. Hetta kan vera myndamál fyri ein, sum er gávuríkur, ein "songfuglur", men situr fastur í sínum búri, men fuglinum leingist enn at sleppa burtur.

Áseting av stykki til upplestur - *næmingurin vísir á, hvat hann vil lesa hart úr prótøkuuppleggjnum (uml. 1/3 normalsíða). Er prótøkuuppleggið ikki ein tekstur, velur lærarin stykki til upplestur.*

Eg havi set merkir á pappíri, har sum eg fari at lesa upp.

Keldulisti – *keldur (bøkur, netsíður o.a.), sum hava verið nýttar í fyrireikingini av synopsuni.*

"Í búri": Djurhuus, Janus. Yrkingar 1898 - 1948 (1988): Mentunargrunnur Studentafelagsins

"Ísmal": Dahl, Marianna D. Birting (1997): Fannir

"Glaskrukkan": Miné, Høgni. Vencil nr. 12 (2012)